## Obama stuðlar Ísrael



Í gjár gjørdi demokratiska forsetavalevnið, Barrack Obama, greitt, at hann stuðlar Ísrael og eisini fer at gera tað, um hann verður forseti. – Tað verður eingin slingur í valsinum undir míni forsetatíð, tá tað ræður um trygdina hjá Ísrael, segði Obama. Útmeldingin kemur eftir at republikanska forsdetavalevnið, John McCain hevur sagt, at Obama vildi verið favoritkandidaturin hjá Hamas. Islamistiska Hamas hevur ræði á Gaza-strípuni, haðani teir senda heimagjørdar rakettir móti ísraelskum býum. – Vit tingast ikki við teir fyrr enn teir viðurkenna Ísrael og gevast tið terrorismu, segði Obama, skrivar Politiken.

## Fritzl hevur Frankenstein

Ein bólkur av sálarfrøðingum byrjaðu í gjár eina umfatandi uppgávu. Teir skulu finna útav, hvat er farið fram inni í høvdinum á Josef Fritzl seinastu 24 árini. Var tað illskapur ella sinnissjúka, sum dreiv verkið hjá tí 73-ára gamla incestbrotsmanninum? Fyribils kann Fritzl síggja fram móti eini fleiri mánaðir langari mentalkanning. Serfrøðingar skulu finna fram til, um hann skal dvøljast í einum fangakliva ella á einum sinnissjúkrahúsið. Ein týskur sálarfrøðingur, Christian Ludke, heldur, at Josef Fritzl líður av Frankenstein Syndrominum, ein sinnislíðing sum hevur eina óbendandi trongd at herska yvir lívi og deyða við sær.



*Tað høga Føroyatornið hevur givið íslendska býnum, Kópavági, eitt stórbýarkent brá*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Føroyatornið er omanfyri alt

**Hægsti bygningur í Íslandi stendur í Kópavagi, og tað er ein føroyingur, sum hevur latið byggja 22 hæddir høga húsið, ið millum íslendingar verður kallað Føroyatornið**

BYGGING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

**Ísland**: Kópavágur, sum er samanvaksin við Reykjavík, er skjótast vaksandi býur í Íslandi. Fyri 10 árum síðani búðu 17.000 fólk í Kópavági, men nú búgva út ímóti 30.000 fólk í býnum. Fólkatalið er seinnu nógvu árini vaksið við á leið 1800 um árið. Sjálvt um stígur er komin í íslendska búskapin, sæst hetta ikki á býarmyndini í Reykjavíkar-økinum, har byggikranar dag móti himli allastaðni. Kópavágur fyri Reykjvík er sum Hoyvík fyri Havnina.

Júst í Kópavági byrjaði Jákup á Dul Jacobsen sítt uttanlandsvirksemi saman við Jákupi N. Purkhus. Hetta var í 1987, tá fyrsti handil teirra lat upp. Árið eftir lat ein handil upp á Akureyri, og síðani eru fleiri komnir afturat.

Fyri nøkrum árum síðani fór Jákup á Dul Jacbosen undir at byggja hægsta bygning í Íslandi, sum nú er um at vera liðugur. Við teimum 22 hæddunum er Føroyatornið nakrar fáar metrar hægri enn víðagitna Hallgrímskirkjan í Reykjavík.

Føroyatornið stendur á sama torgi, sum fyrsti handilin liggur hjá Jákupi á Dul Jacobsen. Ketan kallast Rumfatalagerinn, ið er íslendska navnið Skemmuna í Føroyum og Jysk í Danmark.

Tá farið varð undir byggingina av Føroyatorninum, var verkætlanin mett at kosta á leið 400 mió. danskar krónur. Tað mesta er leigað út til skrivstovuvirksemi. Við tí bláligu glasfasaduni tekur tað seg sera væl út í býarmyndini.

Ikki einans háhús verða bygd í Kópavági. Fleiri handilsbygningar eru komnir ella eru á veg, og skjótt verður farið undir at byggja eitt operahús fyri 200 mió. krónur í íslendska býnum, sum er vinarbýur hjá Klaksvík. Kópavágur er eisini kendur fyri tónlistaskúla, náttúrusavn, bókasavn, listasavn, innilokaðan fótbóltsvøll, tvær stórar svimihallir og fleiri nýggjar skúlar.

### Omanfyri 100 handlar

Áhugavert hevur verið at fylgt virkseminum hjá ágrýtna havnarmanninum, Jákupi á Dul Jacobsen. Tað byrjaði við Skemmuni í Havn í 1986, og nú 22 ár aftaná hevur hann yvir 100 handlar í nógvum londum.

Handilsvirksemið í Føroyum og Íslandi er tí bert ein partur av heimsumfatandi virkseminum hjá Jákupi á Dul Jacobsen, sum er á trimum ymsum økjum. Umframt handilsvirksemi, fæst hann við keyp og sølu av fastari ogn og keyp og sølu av virðisbrøvum og partabrøvum.

Men tað var handilin á Hálsi og tann fyrsti handilin í Íslandi, ið løgdu lunnar undir stóra virksemið hjá havnarmanninum. Kortini var tað við stórum spenningi, at hann fór í gongd við at selja dýnur og seingjarklæðir til føroyingar. So spentur var hann, at starvsfólkini ikki vistu, hvar hann var, tá handilin lat upp. Og hann helt seg burtur allan tann fyrsta dagin.

Um hann hevði verið har, hevði hann tó sæð, at kundarnir streymaðu inn, so skjótt hurðarnar lótu upp.

Aftan á Skemmuna og árið eftir tann fyrsta handilin í Reykjavík, gingu níggju ár, áðrenn hann fór víðari út í heim.

Í 1996 breiddi Jákup á Dul Jacobsen handilsvirksemi sítt til Vancouver í Kanada. Her gekst striltið í byrjanini, og tey fyrstu árini misti fyritøka hansara nógvan pening, men síðani kom av álvara vend í. Fimm ár seinni stóð so mikið væl til, at hann dittaði sær at fara út á nýggjar og ókendar marknaðir. Í 2001 lótu teir fyrstu handlarnir upp í Letlandi og Litavia og árið eftir eisini í Estlandi.

Síðani hevur hann sett seg niður í Bulgaria og Rumenia, og so nógv gongd er í virkseminum, at hann hevur sett heili 30 fólk til at ferðast runt í Kina fyri at finna og gera framleiðsluavtalur um røttu produktini at selja í handlunum.

Og sum kunnugt hevur Jákup á Dul Jacobsen stórar ætlanir við Stórutjørn í Hoyvíkshaganum. Um hesar eru eins stórar, og tær vóru í byrjanini, er eitt sindur ilt at meta um.